VEÐRIÐ



Veðrið hósdagin
Vindur av suðri og landsynningi, 8 til 13 m/s, skýggjað veður og onkustaðni regn. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið fríggjadagin
Vindur av landsynningi, 8 til 13 m/s, sum út á dagin veksur upp í 13 til 18 m/s, og sum um náttina snarar í ein eystan við somu vindferð. Skýggjað og av og á regn. Hitin um 5 stig.



Veðrið nýggjárs-aftansdag – leygardag
13 til 18 m/s av eystri, sum seinni hækkar upp í landnyrðing. Um náttina minkar hann vindin nakað, niður í 8 til 13 m/s. Skýggjað og nakað av regni. Hitin um 5 stig. (Tað verður helst so sum so við rakett-líkindum!)

Kalendararok í Vágsbotni

Fleiri túsund jólakalendarar eru seinastu dagarnar bornir oman í Miðlahúsið í Vágsbotni, í morgin verður velur Bassi hepnu vinnararnar.

Orð: Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo
Mynd: Jens Kristian Vang

Sonja og Durita hjálpa Jonhard við at pakka kalendarar út

Nú freistin at lata jólakalendarin hjá Sosialinum inn er um at vera úti, er ferðslan rundan um Miðlahúsið í Vágsbotni øgilig. Tær báðar fryntligu damurnar í móttøkuni ganga fleiri ferðir um dagin út og tøma postkassan, og fólk gongur um dyrnar við kalendarum allan dagin.

Jonhard Hammermarknaðarleiðari í Miðlahúsinum er ovfarin av góðu undirtøkuni, ið kappingin hevur fingið, og sigur at nú er skjótt ikki verandi á skrivstovuni fyri innsendum kalendarum. Hann er ikki liðugur at pakka brævbjálvarnar upp, men hevur boðsent hjálp til hetta arbeiði, soleiðis at klárt verður hjá Bassa at trekkja lut. Jonhard sigur, at hóast hann ikki er liðugur at telja so er greitt, at talan er um fleiri túsund kalendarar.

Tað er ikki so løgið, at áhugin er stórur, tí vinningarnir eru stórir og góðir. Eitt Gávukort frá Miklagarði við virði kr. 20.000, ein familjuferð fyri tvey vaksin og tvey børn við Atlantic Airways við uppihaldi á Lalandia í Danmark, olja frá Shell virði kr. 10.000, familjuvikuskifti í Kongasvituni á Hotel Tórshavn fyri tvey vaksin og tvey børn umframt gávukort til Bowling Høllina, Pizzacafeina og Havnar Bio, 10 Sodavatnskassar frá Faxe Kondi og 8 kilo av Merrild kaffi frá Poul Michelsen heilsølu.

Freistin at lata kalendarar inn er úti í morgin 29. desember kl. 12. So enn ber til at koyra kalendarar í postkassan hjá Miðlahúsinum. Seinnapartin í morgin fer Bassi at draga teir kalendararnar, ið vinna. Vinnararnir verða almannakunngjørdir í Sosialinum fríggjadagin.

Umframt hesa kappingina hevur Sosialurin havt teknikapping og Sudoku kapping í desember, freistin at lata inn í hesum kappingum eru somuleiðis kl. 12 í morgin. Eisini hesar kappingar hava havt stóra luttøku.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-5
Nuuk	0
Qaqortoq	0
Ammassalik	-8
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	2
Tórshavn	5
Lerwick	4
Aberdeen	8
London	9
Tromsø	-2
Bergen	6
Oslo	--
Stokkhólm	-2
Keypmannah.	2
Helsinki	--
Moskva	-4
Berlin	1
Warzawa	-5
Kiev	-6
Bukarest	-2
Paris	1
Madrid	9
Róm	7
Malorca	14
Athen	9
Malta	12
Tunis	15
Beijing	7
New Dehli	20
Bangkok	23
Jakarta	28
Sydney	--
New York	0
Miami	17
Los Angeles	22
Meksikobýur	--
Panama	32
La Paz	17
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	33

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt hátrýst, 1043 hPa yvir Eystur-Finland, ferðast spakuliga eystureftir. Eitt lágtrýst, 990 hPa, vestanfyri Ísland ferðast norðureftir og dýpist, og eitt annað lágtrýst í ein útsynning úr Íslandi ferðast eystureftir og verður í morgin statt í ein útnyrðing úr Írlandi. Tilhoyrandi brúgvaløg ferðast spakuliga eystureftir til havið vestanfyri Føroyar.



Veðrið hetta komandi samdøgrið
Skýggjað veður við regni av og á. Sunnanvindur og av landsynningi, 10 til 15 m/s, sum í nátt veksur í styrki til 18 m/s. Hitin millum 5 og 8 stig.

GEVID BLÓÐ

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/12 kl. 06^{00}– 27/12. 06^{00}. Hitin í gjár: 7,0°
Minsti hiti máldur í des.: -10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 12,2°



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 26/12 kl. 06^{00}– 27/12 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í desember: 95,4 mm

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

21 desember	Mánin longst frá jørðini
23. desember	Seinna kvarter
31. desember	Tendring
1. januar	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
28. Des	03.47	16.11	02.47	15.11	03.02	15.26	05.47	18.11	06.47	19.11	02.02	14.26	01.02	13.26	04.02	16.26	05.02	17.26	03.32	15.56	04.47	17.11
29. Des	04.36	17.02	03.36	16.02	03.51	16.17	06.36	19.02	07.36	20.02	02.51	15.17	01.51	14.17	04.51	17.17	05.51	18.17	04.21	16.47	05.36	18.02
30. Des	05.31	18.00	04.31	17.00	04.46	17.15	07.31	20.00	08.31	21.00	03.46	16.15	02.46	15.15	05.46	18.15	06.46	19.15	05.16	17.45	06.31	19.00
31. Des	06.29	18.59	05.29	17.59	05.44	18.14	08.29	20.59	09.29	21.59	04.44	17.14	03.44	16.14	06.44	19.14	07.44	20.14	06.14	18.44	07.29	19.59
1. Jan.	07.25	19.52	06.25	18.52	06.40	19.07	09.25	21.52	10.25	22.52	05.40	18.07	04.40	17.07	07.40	20.07	08.40	21.07	07.10	19.37	08.25	20.52

5 707265 100043 >